Tíðindaskriv

Fyribyrgingarráðið er farið til verka

Fyribyrgingarráðið, sum Løgtingið hevur samtykt, skuldi setast á stovn, og sum landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum hevur útnevnt í desember 2000, er nú farið til verka.

Fyribyrgingarráðið er ráð undir landsstýrismanninum og hevur sum uppgávu at styrkja tiltøk fyri heilsufremjing, sjúku- og vanlukkufyribyrging, bæði í almanna- og heilsuverkinum. Heruppií liggur á ráðnum:

1) at ráðgeva lands- og kommunalum myndugleikum í sambandi við heilsufremjandi og sjúku- og vanlukku fyribyrgjandi tiltøk,

2) at styrkja heilsufremjandi, sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøk við ráðgeving og stuðuli til royndar- og menningararbeiði kring landið,

3) at taka stig til kanningar og útgreiðingar, sum eiga at verða framdar sum liður í einum heildarfyribyrgingartiltaki, ella sum liður í eini meting av verandi heilsufremjandi og sjúku- og vanlukkufyribyrgjandi tiltøkum,

4) at stimbra gransking og royndum á fyribyrgingarøkinum.

Í fyribyrgingarráðnum sita 7 limir, tilnevndir av landsstýrismanninum fyri 4 ár í senn. Ein limur umboðar undirvísingarverkið, ein limur umboðar almannaverkið og 5 limir eru heilsustarvsfólk.

Teir 7 limirnir eru hesir: Heðin Thomsen, yvirlækni, formaður. Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, næstformaður. Magnus á Stongum, farmaseutur. Eyðvør Mortensen, sosialráðgevi. Mariann Patursson, kostráðgevi. Bjarta Vilhelm, leiðari heilsusystir.

Fyribyrgingarráðið skal yvirtaka arbeiðsøkið hjá fyrrverandi Tubbaksráðnum og AIDS-ráðnum og skal fyribils arbeiða síðustillað við Rúsdrekka- og Narkotikaráðið fram til 1. januar 2002. Tað nýggja fyribyrgingarráðið hevur samtykt, at ráðið hetta fyrsta árið fer at leggja stóra áherðslu á fyribyrging móti tubbakselvdum sjúkum.

»SOS-Knúkur« prentað uppaftur

TÍÐINDASKRIV:

Bókin ”SOS-Knúkur”, sum Grækaris Djurhuus Magnussen gav út fyri jól, er nú aftur at fáa í bókabúðunum.

Bókin, sum snýr seg um flogvanlukkuna í Mykinesi 26. september í 1970, varð útseld longu slaka viku undan jólum. Forlagið prentaði annars 3000 eintøk og væntaði, at tað var ríkiligt.

Eftir nógvar áheitanir hevur Forlagið Steyrin so gjørt av at prenta eitt minni upplag av bókum uppaftur. Og SOS-Knúkur er tískil aftur at fáa í bókabúðunum nú.

Kort komin aftrat

Nú bókin kortini varð prentað uppaftur, gjørdi høvundurin av at fáa nøkur kort í bókina aftrat. Eitt yvirlitskort vísir kósina, sum vanlukkuflogfarið hevði í mun til flogvøllin í Vágum, tá vanlukkan hendi. Ein onnur tekning vísir, hvussu flogfarið rakti vøllin og hvussu tað brotnaði. Seinasta yvirlitið vísir, hvar í flogfarinum ymisku fólkini sótu, tá vanlukkan hendi.

Av tí at kostnaðurin at prenta eitt minni upplag av nýggjum er lutfalsiga nógv hægri enn upprunaliga prentingin, og tá nakrar síður eru komnar í bókina aftrat, er kostnaðurin á bókini eisini eitt vet hægri enn upprunaligi kostnaðurin.

SOS-Knúkur kostar 280 krónur í bókabúðunum.

VIÐMERKINGAR

Hvat er ríkisfelagsskapurin – uttan blokkin

Áki Andreasen
Argir

Tað er nógv sagt og skrivað, síðan henda samgongan stakk út í kortið og við støði í samgonguskjalinum, setti sær sum eitt av sínum aðalmálum at fáa alt vald heim til Føroya, og við hesum tvinna tvey hugtøk saman – nevniliga samanspælið millum avgerðir og ábyrgd. Tað hevur fram til dagin í dag verið rættiliga ógreitt, hvar avgerðarrætturin hevur verið í einstøkum málum, og ábyrgdarkenslan hjá teimum, sum mangan hava tikið avgerðirnar, man mangan hava verið so sum so.

Politiska, og herundir eisini ríkisrættarliga skipan okkara, hevur ikki evnað at skapt ábyrgdarfullar politikarar, og tá meini eg ikki nakað persónligt við tað – hatta er bara veruleikin, frágreiðingin um áttatiárini stendur sum klettaprávfast tilfar um hetta. Alt tos um at tíðirnar vóru ikki sum í dag kann bara metast at vera royndir at fjala veruleikan.

Eitt, sum hevur verið ein gjøgnumgangandi tráður í fullveldiskjakinum er »ríkisfelagsskapurin« og hvat hesin inniber í sambandinum millum Føroyar og Danmark. Tað eru tey, sum meta at alt tað føroyska samfelagið hvílir í hesum »felagsskapinum« og hesin tryggjar okkum, at hungur og hall verður hildið frá durunum.

Blokkstuðulin úr statskassanum hevur ósvitaliga verið tengdur upp í »ríkisfelagsskapin«. Tað er jú rættiliga nærliggjandi at hugsa, at blokkurin og »ríkisfelagsskapurin« skuldu gingið hond í hond, men samráðingarnar við dansku stjórnina hava vist nakað annað.

Hesar samráðingarnar hava avdúkað so sera nógv í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar. Ein av teimum hugvekjandi avdúkingunum er, at blokkurin er eingin sjálvfylgja, hóast Føroyar og Danmark framhaldandi verða í ríkisfelagsskapi saman í allar ævir…

Klokkuklár ábending um hetta sama var, tá danskur ráðharri í tíðindasending hjá rásini TV2 var frammi og kunngjørdi greitt, at tað var upp á tíðina at »hugt« varð at blokkstuðlinum til Føroya, nú ein skattlætti var í uppskoti frá Fíggjarmálastýrinum. Eingin eigur heldur at ivast í, at álvara liggur aftan fyri hesa viðmerking og hetta kom sum áður nevnt eisini greitt fram undir samráðingunum millum partarnar. Eitt rættiliga klárt dømi um, at politisku støðutakanirnar,kunnu fáa avleiðingar fyri viðurskiftini millum Danmark og Føroyar. Hetta skuldi fingið onkrar afturhaldsklokkur at ringt…

Afturhaldið hevur havt ilt við at svølgja hesa avdúking, og her hevur man so valt at trúgva donskum myndugleikum og politikarum, sum gjøgnum privatar telefonsamrøður hava avnoktað at hetta er sagt við samráðingarborðið, hóast føroysku umboðini gjørdu greitt, at at minka og helst avtaka blokkstuðulin var frammarlaga í ætlanunum hjá stjórnini, sjálvt um ríkisfelagsskapurin helt fram ella ikki.

Serliga sambandsmenn hava nýtt nógva orku uppá at roynt at sannført hvørt mansbarn um, at »ríkisfelagsskapurin« er so sera nógv annað enn krónur og oyru, ført hevur verið fram, at mentanarligu og familjubondini millum Føroyar og Danmark eru stórur partur av hesum felagsskapi, men hvør hevur sagt tað, at hetta ikki kann halda fram, bara tí at vit her í Føroyum vilja hava avgerðarrættin yvir okkara egna landi?

Men vit onnur, sum eru sannførd um, at danir ikki framhaldandi fara at senda pening til Føroya, hóast tann sokallaði »ríkisfelagsskapurin« heldur fram ella ikki, so stendur tað greitt fyri okkum, at tann dag tá danir fara at avvikla blokkin fyri okkum, tá fáa vit so slettis onga ávirkan á, hvussu hetta skal gerast, tá eru vit aftur í tí líknandi støðu, sum vit vóru í, tá føroyska samfelagið bleiv sett undir umsiting fyrst í nítiárunum – og ta gongdina kenna vit alt til.

Út frá øllum hesum er tað so serstakliga týdningarmikið, at vit sum føroyingar gera okkum greitt, hvat tað er, sum liggur fyri framman og leggja gamalt agg á hillina. Skulu vit hava tað sitandi á okkum, at vit ikki kunnu viðurkennast sum tjóð? Skulu vit lata avgerðarrættin gleppa okkum av hondum, og endaliga leggja okkum undir danska veingjabreiðið? Skulu vit fyri umheiminum melda út, at vit avreiða okkara land til donsku stjórnina at umsita?

Vit vita hvørjar møguleikar danska grundlógin tillutar okkum, eru vit nøgd við tað? Vit vita somuleiðis, at danska stjórnin til eina og hvørja tíð kann blokkera einum ynski um veruligar samráðingar, tað hava vit verið vitni til, har stjórnin ferð eftir ferð fann upp á nýggj »viðurskifti«, sum blokeraðu fyri einari sunnari samráðingarloysn, og ikki helt gjørdar avtalur.

Ella skulu vit verða við til at stinga út í kortið, hvussu okkara samfelag skal skipast? Skulu vit verða við til at mynda tann politikkin, sum skal til fyri at fáa fult vald yvir okkara landi? Skulu vit umsita okkara land og harvið tey virði, sum liggja í hesum yvir fyri útheiminum? Skulu vit, sum her búgva, virka fyri at samfelagsskipanin til fulnar verður føroysk og tillagað til føroysk viðurskifti? Skulu vit taka av tí tilboðnum, at tað verða ættarlið av føroyingum, sum tvinnað saman tvey grundleggjandi hugtøk, nevniliga avgerð og ábyrgd, tvey hugtøk, sum hava verið atskild í føroyskum politikki síðan heimastýrislógin bleiv uppfunnin.

Hetta eru bara nakrir av spurningunum, sum stinga seg upp, tá talan er um framtíðarstøðu Føroya, og hetta eru ikki hissini avgerðir.

Tá vit hava tað í huganum, at blokkurin verður eitt evni, sum verður tikið upp, óansað um vit samráðast við fullveldi sum endamáli ella ikki, og tá tað er ein sannroynd, at »ríkisfelagsskapurin« bert er krónur og oyru, hvat stendur tá eftir, um vit velja afturhald í staðin fyri framburð? Jú, tá er bara ein »ríkisfelagsskapur« við einari heimastýrislóg, sum bindur okkum á hond og fót, við einum blokki, sum verður minkaður eftir donskum treytum – fyri endaliga at verða burtur. Og framvegis tá sum nú sita danskir myndugleikar við buktini og báðum endunum tá talan er um okkara landi…

Hetta er tað ítøkiliga alternativið til fullveldispolitikkin hjá samgonguni.

Tíðindaskriv frá Mentamálastýrinum

Fyribils stjóri á Trøðni

Sum kunnugt gjørdi landsstýrismaðurin í sínari tíð av at seta arbeiðsbólk, mannaðan við Hans Tryva Teirin, Tóru Tóroddsdóttir og Steintóri Rasmussen at viðgera spurningin um sernámsfrøðiliga virksemið í Føroyum og at skriva álit um tað. Arbeiðsbólkurin skal vera liðugur við arbeiði sítt í seinasta lagi 1. oktober 2001.

Landsstýrismaðurin hevur tikið til eftirtektar uppsagnir frá stjóranum í Sernámsdeplinum og leiðaran í Skúlanum í Sernámsdeplinum og gjørt av ikki at lýsa viðkomandi størv leys, fyrrenn oman fyri nevndi arbeiðsbólkur er liðugur við arbeiði sítt og avgerð er tikin um, í hvørjum líki tað sernámsfrøðiliga virksemið skal verða.

Ímeðan eru: Hans Eli Dahl, lesiráðgevi, settur fyribils stjóri í Sernámsdeplinum í tíðarskeiðnum frá 1. febr. 2001 til 31. juli 2002, og Magnus Hansen, serlærari í Vági, er settur fyribils skúlaleiðari í Sernámsdeplinum saman tíðarskeið. Magnus Hansen kann tó ikki byrja í fyribils starvinum fyrr enn mánadagin 5. febr. 2001. Sagt er Hans Eli Dahl um byrjanardagin hjá Magnusi Hansen.

ítróttur

Nr. 25 • týsdagur • 6. februar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Kreppa í Klaksvík

Vanligi venjarin var ikki við, tá Stjørnan sunnudagin fór til Giljanes at spæla móti Sólljuni. Vesna Tomajek hevði ístaðin ábyrgdina av liðnum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað er einki at taka seg aftur í, at seinastu dystirnir hjá Stjørnuni als ikki hava lagað seg soleiðis, sum leikararnir sjálvar høvdu vónað.

Sjey dystir hava bert kastað tveir sigrar av sær, og hetta er heldur lítið, um ein skal gera sær vónir um at endurvinna gullið, sum Stjørnan annars vann sera sannførandi í fjør. Tvey av tapunum hava samstundis verið í Coca-Cola kappingini, og tí hevur Stjørnan heldur ikki møguleika at bjarga árinum við einum gullmerki í hesari kapping.

Rógvi Nielsen hevur í ár vant kvinnuliðið hjá Stjørnuni, men tað tykist lítið sannlíkt, at hann fer at sita í sessinum restina av árinum

Ikki við í Vágunum

Hetta tykist nú eisini at hava fingið avleiðingar, tí hóast tað ikki ber til at fáa nakað váttað í málinum, so er nú líkt til, at Rógvi Nielsen ikki longur fer at standa við ábyrgdini av liðnum.

Sostat hevði Vesna Tomajek, sum í fjør var leikandi venjari hjá Stjørnuni, ábyrgdina, tá Stjørnan vitjaði hjá Sóljuni sunnudagin.

Sambært okkara upplýsingum er hetta íkomið, eftir at liðið um vikuskiftið hevði tveir leikarafundir, harav í øllum førum annar helst kann rópast kreppufundir. Hetta var eftir tapið leygardagin, har seinasta vónin um gullmerki mundi fara fyri skeyti.

Frídagur

Vit royndu sunnukvøldið at fáa viðmerkingar frá pørtunum í málinum, men hetta tóktist eingin at vera serliga áhugaður í.

– Vit er væl stillaði við venjarum, var svarið vit fingu, tá vit fingu orð á Ólav Poulsen, sum er formaður í hondbóltsdeildini í Klaksvík.

Spurdur, hví Rógvi Nielsen ikki var við í Vágunum, svaraði formaðurin, at Rógvi hevði frí hendan dagin.

Heldur ikki vildi hann svara, hvørt Rógvi heldur ikki verður við komandi dystirnar hjá Stjørnuni.

– Tað er einki sum helst avgjørt um nakað sum helst, og tí kann eg ikki gera nakrar viðmerkingar til málið, segði formaðurin.

Eingin viðmerking

Høvuðspersónurin sjálvur vildi heldur ikki gera nakrar viðmerkingar til málið.

– Eg havi ongar sum helst viðmerkingar um hatta, annað enn at eg hevði frí í dag, svaraði Rógvi, tá vit spurdu, um hann annað hvørt var givin, ella hevði fingið sekkin.

Rógvi er annars eisini høvuðsvenjari fyri ungdómsdeildina hjá Stjørnuni. Spurdur, um, rokið, sum nú tykist hava vera um kvinnuliðið kanska fer at fáa avleiðingar fyri hendan partin av arbeiði hansara, svarar hann enn einaferð: Ongar viðmerkingar.

Sostatt tykist vera torført at fáa nakað sum helst at vita um, hvat gongur fyri seg handan leiktjøldini hjá Klaksvíksfelagnum. Staðfestast kann tó, at Rógvi Nielsen ikki stóð við stýrisvølin, tá spælt varð á Giljanesi. Kreppufundirnir hava verið nógvir í tali seinastu tíðina, og hóast eingin partur vil siga nakað, so tykist í øllum førum meira enn sannlíkt, at eitt skifti av onkrum slag verður at sígja á venjarabeinkinum hjá Stjørnuni framyvir.

Calix kosin besti spælarin

Hálvføroyski Calix Blak var valdur besti spælarin í norsku kurvaból tskappingini í farna mánaði

KURVABÓLTUR
Eyðun Klakstein

Ungi Calix Blak gjørdi rættiliga vart við seg í norsku kurvaból tskappingini í januar mánaði.

Hann hevur leingi verið mettur sum mest lovandi kurvaból tsspælarin í Noregi, og í januar mánaði gjørdi hann bart. Hann spældi serstakliga væl og gjørdi nógv mál.

Hetta fekk hyggjarar hjá norsku sjónvarpsrásini TV2, sum hevur rættindini til kurvaból tin, at velja Calix til besta spælaran.

– Hetta er fyrsta ferðini, eg verið valdur besti spælari, og tað eri eg sera glaður fyri, sigur Calix Blak Ndiaye.

Venur nógv

Calix spælir við Ulriken Eagles, sum er úr Bergen og telist millum sterkastu feløgini í Noregi, og hann er millum stuðulsspælararnar á liðnum.

– Tað gekk sera væl í januar, eg gjørdi nógv mál, og tað hevur sjálvandi nógv at siga, sigur Calix.

Onkrir av týðandi spælarunum hjá Ulriken Eagles hava iki fingið spælt seinastu vikurnar, og tað hevur eisini lagt størri ábyrgd á unga spælaran. Hesa ábyrgd hevur Calix til fulnar klárað at borið.

– Eg geri nógv við venjingina, og at eg havi skotið eini 500 ella 600 skot hvønn tann einasta dag, hevur eisini gjørt, at eg raki kurvina betri enn nakrantíð áður, sigur Calix.

Nógvar avbjóðingar

Sunnudagin spældu Calix og teir finaluna í steypakappingini, men hana taptu teir.

17. til 19. februar skal Ulriken Eagles spæla ímóti týsku Würzburg og estisku Talinn um pláss í norðureuropeisku kappingini, NEBL.

Eftir hesar dystirnar verður lagt til brots í endaspælinum í norsku landskappingini.